## Knústi knallertir

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Ein ungur maður hevði fríggjakvøldið knúst tvær knallertir á Toftum. Hann var frá sær sjálvum, og hevði brotið hesar báðar knallertirnar.

Annars hevur vikuskiftið í Eysturoynni verið stak friðarligt, verður sagt frá politistøðini í Runavík.

Eitt lítið harðskapsmál í sambandi við Túnadansin á Glyvrum var leygarkvøldið, tá ein maður fekk nevan framman á.

Politistøðin við Sandin í Klaksvík letur eisini væl at. Klaksvíkingar hava skikkað sær stak væl um vikuskiftið. Einasta løgreglan hevur havt um hendi, vóru tveir fullir menn og ein leysur hestur.

## Koyrdi útav í Oyndafirði

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Leygardagin kom ein maður inn á politistøðina í Havn fyri at melda eitt ferðsluóhapp. Maðurin hevði koyrt útav í Oyndafirði, og var komin allan tann langa vegin til Havnar fyri at melda óhappið ístaðin fyri at fara inn á politistøðina í Runavík. Politiið hevði mistanka um, at maðurin møguliga var ávirkaður, og tí varð blóðroynd tikin av honum.

## Ætlaðu at seta eld á hús

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Fríggjakvøldið ætlaðu nakrar ungar gentur í Porkeri at seta eld á eini hús. Tær høvdu sett eld á nakrar tómar sigarettpakkar, sum tær síðani høvdu stungið í eitt hol í eini kiosk. Nógvur roykur kom frá, og eldur eisini, men tær sløktu sjálvar eldin aftur.

Frá politistøðini á Tvøroyri verður sagt, at tosað hevur við foreldrini, og sum skilst, so er málið meira ella minni slept.

Genturnar vóru 14 – 15 ára gamlar.

## Ófriður við Badmintonhøllina

LØGREGLUTÍÐINDI
*Ingrid Bjarnastein*

Leygarkvøldið var Ársins DJ-show í Badmintonhøllini í Havn, og aftur hesuferð varð klagað um ófrið. Frá politistøðini í Havn frætta vit, at talan var um nakrar fløskur, sum ungdómurin knústi uttanfyri høllina. Og hetta hevði við sær, at grannarnir fingu ikki náttarfrið.

Annars hevur vikuskiftið verið ógvuliga friðarligt, og væl verður latið at á politistøðini í Havn.

# Seinasti harmonikutúrurin við gomlu Norrönu




*Norröna fór mánadagin sín síðsta harmonikutúr. Næstu ferð verður tað nýggja og stásiliga Norröna, sum fór av bakkastokki leygardagin, sum fer at hýsa harmonikuspælarum og gestum*

*Savnsmynd*

**Mánamorgunin fór Norröna av Havnini á sín seinasta harmonikutúr. Við vóru 730 fólk, og yvir helmingurin av teimum vóru við bara til harmonikutúrin**

FERÐAVINNA
*Ingrid Bjarnastein*

Hetta er 10. árið Smyril Line skipar fyri harmonikutúri við Norrönu, og seinasti túrurin við hesi Norrönu byrjaði í gjár. Seinasti túrurin varð sostatt eisini ein jubileumstúrur.

– Norröna fór avstað við 730 fólkum, og harav vóru 470 av teimum við fyri at sleppa á Harmonikutúr, sigur Áki Jespersen, ferðafólkaleiðari á Smyril Line.

Sum tað liggur í orðinum, so er nógvur harmonikutónleikur á skránni. Við á túrinum eru eini 40 harmonikuspælarar, sum spæla frá morgni til myrkurs runt um á skipinum. Spælt verður í cocktailbarrini, í náttklubbanum, í matstovuni og aðrastaðni.

Í gjárkvøldið, mánakvøldið, var eitt stórt syngið við tiltak í kafeteria, og á midnátt í kvøld er ætlanin at harmonikuspælararnir fáa eitt diplom, sum sigur, at teir hava verið við, umframt gávur og annað gott.

– Áhugin fyri harmonikutúrinum vísir seg at vera ógvuliga stórur, sigur Áki Jespersen.

– Tey bestu kømurini fara beinanvegin, og hesuferð høvdu vit bara couchettir eftir at bjóða fólki. Í ár byrjaðu vit við at lýsa tann 4. apríl, og vit plaga at seta eitt ávíst dato á nær tað ber til hjá fólki at bíleggja ferðaseðlar. Hetta verður gjørt fyri, at tað ikki skal bera til at leggja seg á ferðaseðlarnar eitt ár frammanundan.

Áki Jespersen vísir á, at tað eru tey somu fólkini, sum venda aftur á harmonikutúrarnar. Hetta er jú eitt upplagt høvi at hitta gamlar vinir, og eisini er ein slíkur túrur ógvuliga hugnaligur.

Ein harmonikutúrur við Norrönu kostar annars millum 750 og 1195 krónur.

# Clickhaze heldur fast um sín tónleik

**Hóast Clickhaze seinastu vikurnar hevur trivist væl á føroyska hitlistanum, ætla tey ikki at leggja seg á tann meira popputa bógvin fyri at fáa fleiri hitt**

TÓNLEIKUR
*pop.fo*

Seinastu 9 vikurnar hava ungfólk í Føroyum atkvøtt sangin Daylight hjá Clickhaze inn á fremsta plássið á 15 teimum bestu, sum er hitlistin hjá ÚF.

Tað er sjáldan, at nakar bólkur klárar at liggja so leingi á ovastu rók á hesum lista, og hetta er eisini fyrstu ferð, at Clickhaze hevur slíka eydnu á hitlistanum.

Men hóast Clickhaze, sum spælir sín serstaka og øðrvísi rocktónleik, nú í nakrar vikur hevur stórtrivist á 15 teimum bestu, so ætla tey ikki at broyta tónleikin hjá sær fyri at fáa fleiri hitt í tráð við Daylight, sum telist millum teir meira mainstreamsangunum hjá bólkinum.

– Vit høvdu ikki væntað, at Daylight fór at liggja nummar 1 á 15 teimum bestu. Tað er eitt sindur løgið, men sangurin er rættiliga popputur, segði Jón Tyril við Vikuskiftissendingina hjá Útvarpinum fríggjadagin.

– Vit ætla ikki at leggja okkum eftir nøkrum bara fyri at selja. Vit gera løgini, sum vit vilja hava tey at vera, og um tey so eisini kunnu selja, so er tað bara betur, segði Jón Tyril.



# Sáttmálin sigur, at 500 tons eru eftir

**Vit prenta í dag brot úr sáttmálanum millum Føroyar og Grønland um kongafiskiskapin í Irmingarhavinum.**

**Akraberg liggur framvegis í Reykjavík, og øll manningin er heimkomin.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Akraberg liggur framvegis í Reykjavík og bíðar eftir svari úr landsstýrinum.*
*- Vit eiga kvotu eftir í Barentshavinum, men skulu vit í Irmingarhavið at royna, nyttar einki at fara hagar, tá ið vit eru komin út í november, tí veðrið er so ringt á leiðini, sigur Anfinn Olsen, reiðari.*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Sosialurin hevur nú fingið avrit av sáttmálanum, sum er galdandi millum landsstýrið og grønlendska heimastýrið um kongafiskiskapin í Irmingarhavinum.

DFG-kvotan (Danmark, Føroyar og Grønland), sum talan er um, er ein kvota, sum NEAFC letur kongaríkinum.

Av hesi kvotu, sum er góð 24.000 tons, fær Grønland sum strandaland til Irmingarhavið meginpartin, men eftir eru 3.400 tons til Føroyar.

Aftrat hesum 3.400 tonsunum, stendur í avtaluni, at – "Har fiskeriet på kvoten den 10. august 2002 resulteret i fangster på 8.000 tons eller der under, udløses en additionel allokering til Færøerne på 500 tons".

Tað sama stendur um dagin, 15. juli 2002; tá fáa føroyingar eisini eina eykakvotu, um fiskiskapurin hevur verið 5.000 tons ella minni.

Men í fyrra førinum vórðu meira enn 5.000 tons veidd, og tí kom eingin eykakvota til Føroyar. Eingin togan var um tað.

Men nú 10. august kom, vóru bara stívliga 7.300 tons fiskaði, og tað eigur sambært sáttmálanum at geva eina eykakvotu uppá 500 tons til Føroyar.

Og tí var tað, at Akraberg kom heim úr Barentshavinum og fór í Irmingarhavið at royna eftir kongafiski.

Men teir vóru bert komnir á fiskileið, tá ið landsstýrið gav skipinum boð um, at kvotan var uppi, og at loyvið tískil varð tikið frá skipinum at veiða kongafisk á leiðini.

### Reiðarin veit ikki sjálvur

Sosialurin hevur roynt at funnið fram til, hvør veruliga orsøkin til ósemjuna millum Føroyar og Grønland er, men tað hevur ikki eydnast til fulnar.

Vit høvdu Jørgen Niclasen í telefonini mánamorgunin. Tá var hann staddur í Grønlandi, so hetta var rættiliga tíðliga! Vit avtalu at tosa aftur, tá ið hann er komin heimaftur.

Anfinn Olsen, reiðari á Akraberg, heldur ikki, at stríðið snýr seg um, hvørt fiskaði eru meiri enn tey stívliga 7.300 tonsini, 10. august.

Hann sigur, at málið er ein spurningur millum landsstýrið og grønlendsku myndugleikarnar, men dugir ikki at skilja, hví kongafiskiskapurin í Irmingarhavinum skuldi steðgast, tá ið avtalan er so greið, sum hon í veruleikanum er.

– Eg veit ikki, hvat hendan toganin snýr seg um. Eins og tú ringir til myndugleikarnar, so ringi eg eisini og royni at finna út av, hvar málið er strandað, og hvussu verður. Men líkt er ikki til, at her hendir nakað, sigur reiðarin.

### Nú ella ikki

Akraberg liggur framvegis í Reykjavík, men øll manningin er heimkomin. Skipið hevur kvotu eftir í Barentshavinum, men vildi helst sloppið á kongafiskaveiði sambært teirri avtalu, vit hava við Grønland.

– Skulu vit í Irmingarhavið, er neyðugt at fara, áðrenn vetrarveðrið kemur. Har er ikki roynandi um veturin, tí lágtrýstini koma tann vegin.

Anfinn Olsen leggur aftrat, at reiðaríið noyðist heilt skjótt at taka eina støðu, hvat gerast skal.

– Hetta er ikki besta tíðin til kongafisk í Irmingarhavinum, men tá ið november mánaði er komin, nyttar einki at fara tann vegin, sigur hann.

# Toganin snýr seg um tulkingar

**Løgmaður og grønlendski landsstýrisformaðurin hava tosað saman um kongafiskakvotuna í Irmingarhavinum.**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*



*Løgmaður, Anfinn Kallsberg, sigur, at grønlendski landsstýrisformaðurin lovaði at taka málið um kongafiskakvotuna í Irmingarhavinum upp, tá ið hann kemur yvir aftur til Grønlands.*
*- Tað er ógvuliga umráðandi fyri samstarvið millum londini, at semja er um tulkingarnar, sigur hann.*

Beint áðrenn Sosialurin fór til prentingar í gjár, hittu vit Anfinn Kallsberg, løgmann, sum í síðstu viku var á ríkisfundi saman við danska forsætisráðharranum og grønlendska landsstýrisformanninum.

Meðan Jonathan Motzfeld var í Føroyum, nýtti løgmaður høvi at reisa málið um kongafiskakvotuna í Irmingarhavinum yvirfyri grønlendska starvsbróðrinum.

– Vit tosaðu um málið, og Motzfeld lovaði at taka málið upp, tá ið hann kemur yvir aftur til Grønlands.

Løgmaður veit eisini at siga, at nú Jørgen Niclasen hevur verið í Grønlandi, hevur hann eisini reist málið um kongafiskakvotuna har yviri.

– Men eg havi ikki tosað við Jørgen enn og veit tí ikki, hvat er komið burtur úr hesum, sigur løgmaður.

### Togan um tulking

Anfinn veit at siga, at toganin millum føroyskar og grønlendskar myndugleikar snýr seg um tulkingar av sáttmálanum millum londini.

– Vit halda, at vit eiga hasi 500 tonsini aftrat, tí veiðan hjá føroyskum og grønlendskum skipum var minni enn 8.000 tons, 10. august. Men her hanga grønlendingar seg nú í, at samlaða veiðan er nógv størri, tá ið veiðan hjá øðrum skipum, sum eisini fiska av grønlendskari kvotu, er íroknað.

Anfinn dugir tó ikki í løtuni at siga, hvat hevur verið praksis onnur ár og vísir til, at tað veit fiskimálaráðharrin, tá ið hann kemur heimaftur úr Grønlandi.

Løgmaður vónar tó, at ein loysn fæst á hesum málinum, soleiðis at Akraberg sleppur avstað aftur.

– Tað er so ógvuliga umráðandi, at vit eru samdir um tulkingarnar, tí hetta hevur so stóran týdning fyri samstarvið millum londini, sigur Anfinn Kallsberg at enda.

# Nógvir húsagangir í Norðurnoregi

NOREG
*Vilmund Jacobsen*

Talið av húsagangum í Troms og Nordland í Norðurnoregi er økt við meira enn 45% higartil í ár. Við endan av juni mánaða høvdu ikki fyrri enn 257 húsagangir verið í hesum báðum norsku økjunum ella fylkjunum, sum norðmenn rópa tað; tað eru 80 fleiri enn somu tíð síðsta ár.

Í Finnmørkini fara harafturímóti færri á húsagang.

– Mín størsti ótti er, at bankarnir ikki tora at taka váðan, tí tá fara vit veruliga at merkja niðurgangstíðir, sigur stjórin í NHO-Troms, Arne Eidsmo, við blaðið, Nordlys.

Prosentvísa økingin av virkjum, sum fara av knóranum, er størst í Troms. Fyrra hálvár í ár vóru 115 húsagangir í økinum. Síðsta ár var talið 79. Nordland hevur havt 142 húsagangir higartil í ár móti 98 somu tíð í fjør.

Í Finnmørkini er støðan sum sagt ein onnur. Higartil í ár eru 37 fyritøkur farnar av knóranum ella tríggjar færri enn somu tíð í fjør.

Í Noregi siga tey, at tað er náttúrligt, at støðan í Finnmørkini ikki er,sum í Troms og Nordland, tí nógvir húsagangir hava verið innan KT-vinnuna og tænastuvinnuna, og her eru færri fyritøkur av slíkum slagi.

– Vit hava ikki lagt til merkis, at okkara limir mugu arbeiða so hart, undantikið teir, sum starvast í fiskivinnuni. Flestu húsagangirnir eru í smávinnuni, har fá fólk eru til arbeiðis, sigur Arne Eidsmo.

Sum skilst, hevur ein partur av norsku fiskivinnuni tað rættiliga strævið, og heldur norska krónan sær, har hon er í dag, rokna norðmenn við, at hetta fer at ganga út yvir útflutningsvinnuna.